## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul millum eystan og sunnan og mjørki í støðum, møguliga sirm. Annars sólglottar og hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 17 og 20 stig.




**Veðrið Ólavsøkuaftan:**
Lot til andøvsgul av suðri og fyrrapartin møguliga regn, men annars turt og sólglottar, tó mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið Ólavsøkudag og sunnudagin:**
Ólavsøkudag veksur hann vindin upp í ein strúk av eystri og regn. Sunnudagin minni vindur og ælingur. Hitin millum 14 og 18 stig.

ÓLAVSØKA

# Ólavsøka á Bryggjuni

**Føroyskur tónleikur setir dám á Ólavsøkugestir á Bryggjuni í Keypmannahavn kunnu gleða seg til eitt sera fjølbroytt og forvitnisligt úrval av føroyskum tónleiki**



*Eitt forvitnisligt úrval av føroyskum tónleiki fer at seta sín dám á ólavsøkuhaldið á Bryggjuni í Keypmannahavn*

**Ólavsøka**
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Umframt kappróður, gøtusjónleik, gudstænastu, framsýning, midnáttarsang, fýrverk og mangt annað fer eisini føroyskur tónleikur at seta dám á ólavsøkuhaldið á Bryggjuni í Keypmannahavn.

Jazzur og dansitónleikur Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag fara Brandur Øssursson og hansara kvartett á pall. Teir eru kendir og væl dámdir í øllum norðanlondum fyri at spæla væljóðandi swingjazz frá fimtiárunum. Á Bryggjuni um vikuskifti verða bæði evergreens og kend jazzløg á skránni.

Ólavsøkukvøld spæla Vestmenn til dans. Er tað nakar, ið dugir at fáa fólk út á dansigólvið, so eru tað júst Vestmenn – ella sum teir sjálvir siga," Tann reyði tráðurin hjá okkum er at fáa fólk at dansa, syngja, og gloyma seg burtur eina løtu." Og tað fáa fólk ríkiligt høvi til ólavsøkukvøld á Bryggjuni, tá Vestmenn fara at spæla til tann ljósa morgun.

Vísusangur, poppur og rockur Á Kafékonsertini ólavsøkuaftan eru kendir tónleikarar sum Hanus G. Johansen, Hans Hjalti Skaale umframt Hans Jacob K. Mouritsen og hansara bólkur á skránni.
Hanus man vera ein tann kendasti føroyski vísusangarin. Hansara einfalda guitarspæl, djúpa rødd og serstøku tónar hava samljóð ikki bert hjá føroyingum, men eisini hjá øðrum norðbúgvum. Hanus hevur gjørt fleiri av yrkingunum hjá Poul F til fólkaogn, og beint nú er hann saman við øðrum í ferð við at gera eina nýggja fløgu.

Hans Hjalti kann av sonnum sigast at vera kreativur. Á konsertini kunna áhoyrarnir vænta at hoyra tættir og vísur, sum taka upp mong ymisk evni, har skemtið aloftast verður brúkt til at siga nakrar sannleikar.

Hans Jacob gav út sína fyrstu fløgu í vár. Fløgan, sum eitur "Navnleysur" var væl fagnað bæði í Danmark og Føroyum. Á konsertini fer hann og hansara bólkur at framføra eina blanding av fólkatónleiki, blues, poppi og rock.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 18 |
| Aberdeen | 23 |
| London | 27 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 28 |
| Warzawa | 31 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 30 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 32 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 15 |
| New York | 29 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1014 hPa. við Føroyar fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1011 hPa. vestan fyri Írland fer eisini í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður nær Føroyum mikudagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland grynnist. Eitt djúpt lágtrýst í landsynning úr Hvarvinum stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani kemur spakuliga hendavegin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/7 kl. 06⁰⁰– 25/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,7 mm – mált frá 24/7 kl. 06:00 – 25/7 kl. 06:00
Avfallið higartil í juli: 92,2 mm





www.sosialurin.fo





## VESTFALLSKYRRINDI

29. juli — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. Juli | 07.45 | 20.10 | 06.45 | 19.10 | 07.00 | 19.25 | 09.45 | 22.10 | 10.45 | 23.10 | 06.00 | 18.25 |
| 26. Juli | 08.33 | 20.56 | 07.33 | 19.56 | 07.48 | 20.11 | 10.33 | 22.56 | 11.33 | 23.56 | 06.48 | 19.11 |
| 27. Juli | 09.17 | 21.39 | 08.17 | 20.39 | 08.32 | 20.54 | 11.17 | 23.39 | - | 12.17 | 07.32 | 19.54 |
| 28. Juli | 09.58 | 22.18 | 08.58 | 21.18 | 09.13 | 21.33 | 11.58 | - | 00.39 | 12.58 | 08.13 | 20.33 |
| 29. Juli | 10.36 | 22.55 | 09.36 | 21.55 | 09.51 | 22.10 | 00.18 | 12.36 | 01.18 | 13.36 | 08.51 | 21.10 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. Juli | 05.00 | 17.25 | 08.00 | 20.25 | 09.00 | 21.25 | 07.30 | 19.55 | 08.45 | 21.10 |
| 26. Juli | 05.48 | 18.11 | 08.48 | 21.11 | 09.48 | 22.11 | 08.18 | 20.41 | 09.33 | 21.56 |
| 27. Juli | 06.32 | 18.54 | 09.32 | 21.54 | 10.32 | 22.54 | 09.02 | 21.24 | 10.17 | 22.39 |
| 28. Juli | 07.13 | 19.33 | 10.13 | 22.33 | 11.13 | 23.33 | 09.43 | 22.03 | 10.58 | 23.18 |
| 29. Juli | 07.51 | 20.10 | 10.51 | 23.10 | 11.51 | - | 10.21 | 22.40 | 11.36 | 23.55 |

5 707265 100036 >